Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Erling Eidesgaard, løgtingsmaður

Svarari: Ingilín Strøm, landsstýrismaður í umhvørvismálum

Evni: Verja av fugli

Spurningar:

1. Metir landsstýrismaðurin, at fuglur, sum eigur her á landi, er nóg væl vardur ímóti órógvandi ferðslu?

2. Um ikki, ætlar landsstýrismaðurin at taka stig til at seta í gildi avmarkingar fyri órógvandi ferðslu eitt nú í ella nærhendis fuglabjørgum, lundalondum, drunnhvítabølum og øðrum viðkvomum økjum, har fuglur eigur?

Viðmerkingar:
Tað kemur oftari og oftari fyri, at órógvandi ferðsla so sum dronur, tyrlur og bátar flúgva og sigla tætt framvið fuglabjørgum runt um í landinum. Sama er helst galdandi fyri onnur øki, har fuglur reiðrast, og har atkomuligt eisini er hjá ferðafólki. Hetta fer fram allar ársins tíðir. Eisini tá fuglurin reiðrast.

Leygardagin 29. apríl fleyg ein tyrla t.d. fleiri ferðir runt um Drangarnar í Sørvágsfirði. Hon fleyg heilt inn ímóti berginum, har fuglur reiðrast.

Á Løgtingi, 1. mai 2023

Erling Eidesgaard